# meistarar – 12 meistarar – 12 meistarar – 12 meistarar – 12 meistarar – 12 meistarar – 12 meistarar – 12

*Heldur ikki hetta kappingarárið var nakar ivi. Kvinnuliðið hjá VÍF var nógv tað besta í landinum, og tó at tað ikki gjørdist við fullum stigatali hesaferð, so var tað ongan tíð nakar ivi um, hvør skuldi gerast føroyameistari hendan veturin. Niðanfyri lýsa vit í stuttum tær 12, sum fingu greipuna til høldar.*



**Alis Høghamar**
Ein av veteranunum á liðnum. Ætlaði at gevast í fjør, men tók av Europa-Cup avbjóðingini, og heldur ikki í ár hevur hennara partur ligið eftir, tá sigrar skuldu stríðast til høldar. Ein sterkur strikuspælari, sum við fysikki sínum skapar nógv pláss til viðleikarar.




**Barbara á Rógvi**
Yngsti leikarin á liðnum. Hóast hon í fyrsta vaksnamannaári sínum ikki hevur verið so nógv á vøllinum, so hevur Barbara prógvað, at hon er ein av teimum, sum VÍF skal byggja framtíð sína á. Ein skotsterkur lámur, sum kann spæla bæði sum bakkur og vongur.



**Fríða Marjunardóttir**
Eftir gjøgnumbrotið í fjør hevur Fríða í ár staðfest seg sum verandi millum bestu miðleikararnar í landinum. Fótfimi hennara ger, at hon eisini væl kann nýtast á veinginum, og í verjuni megnar hon ofta at koma ímillum mótleikarar og soleiðis byrja mótálop.



**Hallfríð Isaksen**
Tó at tað ongan tíð kann vera nøkur løtt uppgáva at kappast við Manuelu um plássið millum stengurnar, so hevur Hallfríð í nógvar mátar verið megnað hesa uppgávu væl. Hevur eisini fleiri ferðir víst, at hon kann koma beint inn í dystir, meðan nógv stendur á.




**Ioana Rápa**
Trífaldi toppskjúttin í landskappingini vann ikki hetta heitið í ár, men hóast hetta, so er skotstyrkin framvegis hin sama. Ein loðandi vinstrahond, sum enn sendir bóltarnar somikið hart avstað, at málverjarnir kring landið valla vita, hvat tað var sum hendi.



**Jacklin Durhuus**
Eftir partvísu útlegdina í fjør, var Jacklin hjá VÍF alt hetta kappingarárið. Ein hin største styrkin er uttan iva umhugsni, sum hon aloftast sýnir, og tó at hon kanska hevur størstu styrkina sum bakkur, so hevur hon eisini verið nýtt nógv á veinginum – og við góðum úrsliti.



**Jórun Ludvig**
Kom til VÍF undan hesum kappingarárinum, men ein treiskur knæskaði hevur fyri ein stóran part darvað henni. Tá hon hevur verið tøk, hevur hon tó prógvað, at hon eigur at teljast millum bestu leikararnar í landinum. Ikki minst í verjuni, tó at álopsevnini heldur ikki eru eingi.




**Manuela Stan**
Hevur helst verið týdnignarmesti leikarin í liðnum í ár. Uttan iva besti málverjin í landinum hevur ferð eftir ferð prógvað, at tá tørvur er á tí, so togar hon stórspælið fram. Og sum um bjargingin ikki er nóg mikið, so er hon aloftast eisini atvoldin til drepandi kontraspælið hjá VÍF.



**Nicoleta Radu**
Eftir beinbrotið í fjør hevur Nico aftur í ár verið ein týðandi partur av liðnum. Styrkin er avgjørt í verjuni og kontraspælinum, har hon aloftast er ein sera týdningarmikil bindingarliður, men heldur ikki er hon eiðasør í álopsspælinum.



**Nicolina Eyðbjørnsdóttir**
Er eitt av týdningarmestu vápnunum í kontraspælinum hjá VÍF, har skjótleikin ger, at hon nærum altíð er fyrsti leikarin í álopinum. Hevur harafturat ment seg nógv í verjupartinum, har hon aloftast er før fyri at steingja av í sínum verjuborði.



**Randi Kúrberg**
Er fram um hinar tann, sum heldur liðandanum uppi. Rópar og stýrir alla tíðina í verjupartinum, so hon eisini heldur hinum til. Kontanta spælið kostar kanska viðhvørt, men undir øllum umstøðum er tað neyvan stuttligt at vera á strikuni, tá Randi er við mótpartinum.



**Sóley Mikkelsen**
Ársins leikari í fjør hevur aftur í ár víst seg sum bindiliðurin í álopsspælinum hjá VÍF. Stillisliga ger hon tað, sum krevst, og tó at tað sær lætt út, so eru helst fáar, ið gera henni tað eftir. Bólteyga hennara ger hana eisini til ein sera týðandi part av verjuspælinum.